

# Lágur oljuprísur tyngir grøn partabrøv

**Jógvan Hugo Gardar**

09.08.2015 - 17:03

Oljan.fo

Lækkandi oljuprísurin ger at orkupartabrøvini minka í virði, vísir DNB-greinarin Jon Sigurdsen á, í eini samrøðu við Finansavisen.

Prísurin fyri eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent er í løtuni niðanfyri 50 dollarar. Og hetta er ein lækking uppá næstan 20 dollarar síðani toppin higartil í ár, og tað var í mai. Í sama tíðarskeiðnum hava partabrøvini í grønum fyritøkum minkað í virði.

Einasta sólorku-partabrævið á Oslo Børs, REC Silicon, er lækkað 20 prosent higartil í ár, og 57 prosent síðani august í fjør.

Grøni partabrøvini hildu fram at minka í virði farnu vikuna, hóast Barack Obama-forseti í vikuni kom við nýggjum umhvørvisátøkum.

Ætlanin hjá Obama er at støðugar orkukeldur skulu framleiða 23 prosent av orkuni hjá amerikanarum í 2030, og at $CO_2$-útlátið skal minkað við 32 prosentum, samanborið við útlátið í 2005.

Sigurdsen sigur at tað er eitt sindur øvugt at støðugar orkukeldur minka í virði á keypsskálunum í løtuni, men at hetta helst er tí at íleggjarar og greinarar sum fylgja orkupartabrøvunum revsa allan orkumarknaðin tá oljuprísurin lækkar.